# Brian er transfer-listaður

Danski Brian Andresen, sum síðani í summar hevur styrkt um álopið hjá B68, er ein av spælarunum á transfer-listanum hjá danska spælarasambandinum. Har sæst, at sáttmálin hjá Brian við B68 gongur út í heyst, og tí er hann leysur at samráðast við onnur feløg. Á listanum eru eisini Jónas Tór Næs, sum í løtuni spælir við NSÍ og gamli KÍ-kenningurin, Denni Conteh, sum seinasta hálva árið hevur spælt í Slagelse.



# Eik heldur fram á Amager

Eik Bank hevur valt at leingja sponsor-avtaluna við FC Amager í trý ár afturat. - Yvirbygningurin í FC Amager hevur gjørt tað møguligt at fáa tann størsta einkulta sponsorin, sum limaklubbarnir í felagnum nakrantíð hava havt. Hetta eru vit sera fegin um og stolt av, sigur Todi Jónsson, stjóri í FC Amager. Claus Bodenhoff frá Eik Danmark sigur, at peningastovnurin hevur gjørt av at leingja samstarvið, tí Eik sær stórt virði í hesum. - Vit síggja longu nú, at FC Amager fær góða umrøðu, sum úrslit av fleiri áskoðarum og nógvum dystum, ið verða sendir á TV2 Sport, sigur Claus bodenhoff.

# Toppur móti botni

**Fult umfar er í Formula-deildini í kvøld. Felags fyri dystirnar er, at lið úr ovaru hálvu taka ímóti botnliði**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

B36 er einasta av ovaru liðunum, sum spælir á útivølli, og tí hevur árstalsfelagið á pappírinum truplastu uppgávuna av ovaru liðunum.

At talan so eisini er um uppgávu, sum má loysast uttan leikbannaða Klæmint Matras og skaddu Inga Højsted, Sam Malson og Súna Olsen. Og so er spurningurin, hvussu Heðin Askham velur at blanda kortini, tá hann skal royna at fáa neyðugu stigini við sær til Havnar aftur.

Hjá ÍF stendur eisini nógv á. Liðið er partur av botnstríðnum, har teir nú bert eru tvey stig framman fyri sandoyingar. Tí er eisini alneyðugt hjá teimum at fáa stig burtur úr dystinum.

## Greiðir favorittar

Í øllum hinum førunum er talan um favorittar, sum á pappírinum eru rættiliga greiðir.

Í Havn hevur HB ofta sera gott tak á niðaru liðunum, og tí verður talan helst enn einaferð um møtumikla uppgávu hjá Skála, sum eisini má vera Arnhold Berg fyriuttan.

Á Streymnesi vitjar kreppurakta KÍ hjá oddaliðnum, og tað man neyvan vera dysturin, sum KÍ kundi hugsað sær júst nú. Ikki minst, um havt verður í huga, at EB/Streymur higar til hevur vunnið hvønn tann einasta av sínum átta heimadystum.

Í Gøtu hevur væl koyrandi Víkingur heimavøll móti B68, sum við tapinum móti NSÍ fekk eitt skot fyri bógvin í annars góðu gongdini hjá sær, og seinasti dysturin verður í Runavík, har NSÍ tekur ímóti B71. Fyri bæði liðini er galdandi, at formkurvan snaraði seinasta vikuskiftið, og so er spurningurin, hvussu reaktiónirnar um hetta eru.



*Víkingur hevur havt sera góðan byrð seinastu nógvu umførini. Í kvøld kunnu teir taka enn eitt fet móti heiðursmerkjum, tá B68 kemur á vitjan*

**Formula-deildin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 EB/S | 19 | 13 | - | 2 | - | 4 | 37 | 20 | 17 | 41 |
| 2 B36 | 19 | 9 | - | 6 | - | 4 | 23 | 14 | 9 | 33 |
| 3 Víkingur | 19 | 9 | - | 5 | - | 5 | 33 | 22 | 11 | 32 |
| 4 NSÍ | 19 | 9 | - | 4 | - | 6 | 27 | 24 | 3 | 31 |
| 5 HB | 19 | 8 | - | 6 | - | 5 | 32 | 15 | 17 | 30 |
| 6 B68 | 19 | 7 | - | 2 | - | 10 | 14 | 29 | -15 | 23 |
| 7 KÍ | 19 | 5 | - | 6 | - | 8 | 23 | 28 | -5 | 21 |
| 8 ÍF | 19 | 6 | - | 2 | - | 11 | 24 | 36 | -12 | 20 |
| 9 B71 | 19 | 5 | - | 3 | - | 11 | 22 | 32 | -10 | 18 |
| 10 Skála | 19 | 3 | - | 6 | - | 10 | 16 | 31 | -15 | 15 |

**Seinastu seks dystirnir**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Víkingur | 6 | 4 | - | 2 | - | 0 | 13 | 7 | 6 | 14 |
| 2 B36 | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 7 | 5 | 2 | 12 |
| 3 B71 | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 9 | 6 | 3 | 10 |
| 4 EB/S | 6 | 3 | - | 0 | - | 3 | 8 | 7 | 1 | 9 |
| 5 B68 | 6 | 3 | - | 0 | - | 3 | 5 | 10 | -5 | 9 |
| 6 HB | 6 | 2 | - | 2 | - | 2 | 8 | 4 | 4 | 8 |
| 7 KÍ | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 7 | 6 | 1 | 7 |
| 8 NSÍ | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 6 | 10 | -4 | 7 |
| 9 ÍF | 6 | 2 | - | 0 | - | 4 | 8 | 11 | -3 | 6 |
| 10 Skála | 6 | 1 | - | 1 | - | 4 | 6 | 11 | -5 | 4 |

# Knørrur Regatta í Keypmannahavn

**Leygardagin verður sannur ítróttar- og veitslurómur millum útisetar í Danmark leygardagin, tá róðrarfelagið Knørrur skipar fyri kappróðrarstevnu í Sydhavn**

REGATTA

*Tíðindaskriv*

Kappróðrarstevnan Knørrur Regatta verður í Sydhavnini í Keypmannahavn leygardagin 30. august. Áhugin fyri føroyskum kappróðri er stórur í Danmark og fyrireikararnir vænta nógv fólk í Sydhavn leygardagin.

Tilsamans eru 20 manningar frá hesum feløgum teknaðar til stevnuna: Neystið, Tvøråbáturin, Brundurin, Sorø/FFaV, Brännö Rodklubb og Knørrur. Sum vant er stórur spenningur millum manningar og feløg undan róðrunum, tí tað hevur verið sera javnt millum bátarnar á undanfarnu stevnunum í Norðhavn og Ishøj.

Róð verður í sonevnda 'Kalvebodsløbet' og málið er fyri endan av Molestien og Dæmningsvej - beint undir tokbrúnni millum Sjælland og Amager.

Frásøgumaður verður Heini Davidsen.

Á máløkinum fæst øl og vatn til keyps, umframt tvíflísar, kaffi, køkur og góðgæti. FO Invasion hevur eisini eina sølubúð, har millum annað troyggjur verða seldar.

Bussur 4A steðgar við Sluseholmen/Sjællandsbroen og hiðani er styttri enn 5 minuttir oman á økið.

Tá kappróðurin er av, eru øll - bæði rógvarir, áskoðarar og onnur - vælkomin inn í Føroyahúsið klokkan 19 til ein døgurðabita, føroyskan veitsluróma við felagssangi og dansi. Meira fæst at vita á www.knorrur.dk.



*Fyrireikararnir vóna, at nógv fólk leitar sær til Sydhavn, har regatta verður leygaradgin*